# avsøku



Mynd av Vaglinum í 1922. Sama árið sum fyrsti bilurin kom til landið. Leggið til merkis at ein brúgv gongur av Avhaldsbrekkuni og yvir í Tinghúsvegin

bókin. Birgar Johannesen er stedigur, og hann hevur gjørt eitt risaarbeiði við at savna tilfar, og Justinus tekur sum dømi at Birgar Johannesen hevur savnað Føroya størstu konfirmant-samling.

Onnur bókin um Havnina er viðkomandi fyri tey vaksnu og serliga fyri okkum, sum eru komin so mikið upp í árini, at tað alvorliga er farið at halla hinvegin. Ein stórur partur av hesum fólkum, sum Birgar sýnir fram eru samtíðarmenniskju hjá einum rættiliga stórum parti av dagsins føroyingum, sigur Justinus í fororðunum til nýggju bókina.

## Í huganum alt døgnið

Spurdur um tað hevur verið einsligt at arbeiða við bókunum, sigur Birgar Johannesen, at hann ein stóran part av tíðini er úti hjá fólki og innheintar tilfar, men hann hevur eisini brúk fyri at sita í friði og skriva inn og legga alt í system.

Høvundurin sigur sjálvur, um tíðina hann hevur arbeitt við at savna tilfar og við at leggja bókina tilrættis, at bókin er í huganum alt samdøgri, og hann allatíðina heldur eyga við nýggjum upplýsingum, sum hann kann brúka. Alt, sum hann savnar inn av tilfari, verður goymt í mappum, sum fáa eitt nummar, tað veri seg persónar, handlar, stovnar og so framvegis, soleiðis at tað er lætt at finna aftur, tá hann hevur brúk fyri tí.

Hann hevur frá byrjan av lagt ein leist, sum gongur gjøgnum báðar bøkurnar. Hetta er gjørt soleiðis, at lesarin fær alt tað neyðuga at vita við stuttum teksti og góðum myndum.

## Fleiri enn 1000 myndir

Birgar Johannesen sigur, at bøkurnar hjá honum eru eitt gott útgangsstøði hjá øðrum, sum í framtíðini koma at skriva um Havnina, tí tær innihalda eina rúgvu at fakta og eru bygdar á skrivligar keldur.

Í nýggju bókini, sum er prentað í 6.000 eintøkum, eru yvir 1.000 myndir. Í báðum bókunum eru fleiri enn 8.000 fólk nevnd. Aftast í nýggju bókini er listi í bókstavarað við øllum nøvnunum, og víst er til síðutal, har tey eru umrødd.

– Tað hevur verið strævið at arbeitt við hesum báðum bókunum, men samstundis ein fragd, tí eg brenni fyri sakini, sigur Birgar Johannesen, sum leggur afturat, at hann og konan, Elsa, hava arbeitt sum eitt team, og hevur hetta gjørt arbeiðið munandi lættari.



Hendan myndin er frá fyrst í 50-unum. Áarvegurin er innilokaður frá Kongabrúnni og niðan á Vaglið. Á hesi myndini sæst at demningurin er í brúk



Havnará fer undir heilt. Hetta arbeiðið varð gjørt líðugt í 1957, og samstundis varð vegurin breiðkaður

## Birgar um Havnará

Birgar Johannesen er heitur talsmaður fyri at lata ein part av Havnará upp aftur - frá har sum kioskin á Vaglinum stendur í dag og oman til gamla Apotekið - við eini brúgv frá Avhalds-brekkuni og yvir á Tinghúsvegin.

– Í dag letur alt seg gera. Tað skuldi ikki verið nakar trupulleiki at latið ein part av ánni upp aftur. Í turrveðri kundi ein demningur verið í ánni, eins og gjørt varð áðrenn áin varð løgd undir heilt, og regndagar kundi áin verið ein froðandi fossur.

– Áin kundi verið eitt satt prýði fyri býin og við tíðini verið til eitt sereyðkenni fyri Havnina. Uttan iva kundu nógvir høvuðsstaðir hugsað sær at havt hendan møguleikan – at havt eina rennandi á mitt gjøgnum hjartað í býnum, sigur Birgar Johannessen.

*Tekstur: Magnus Gunnarsson*
*Mynd: Jens Kristian Vang*